Fróðskaparsetur Føroya

Setursskrivstovan

# Reglugerð um nýtslu av teldu til próvtøkur á Føroyamálsdeildini

**Umframt vanligu próvtøkureglurnar eru hesar reglur galdandi fyri tey, sum nýta teldu til próvtøkurnar:**

1. Loyvt er at nýta tekstviðgerð, diskil/geyma frá setrinum, elektroniskar orðabøkur, um tær eru loyvdar til próvtøkuna. Um ikki er loyvt at hava orðabøkur við til próvtøkuna, skal studenturin syrgja fyri, at eingin elektronisk orðabók finst á telduni.

2. Um onnur forrit ella fílar enn tey loyvdu verða nýtt, kemur hetta undir próvtøkusvik.

3. Tað er ikki loyvt studentinum á nakran hátt at senda upplýsingar millum teldurnar.

4. Verður onkur av hesum ásetingum brotin, verður tað viðgjørt sum svik og studenturin burturvístur frá próvtøkuni og setrinum.

5. Studentar skulu fyri ásetta tíð, sum verður kunngjørd við uppslagi, koma á setrið við egnari teldu og prentara (o.ø. sum er neyðugt fyri at teldan riggar: leidningar o.a.). Telda og prentari skulu vera royndarkoyrd í góðari tíð, áðrenn próvtøkan byrjar.

6. Studenturin fær diskil/geyma við arkhøvdi, sum bert kann verða nýtt í Word, frá setrinum, tá royndin byrjar, og skrivar beinanvegin navn sítt á diskilin. Ikki er loyvt at taka diskilin/geyman út úr próvtøkuhølinum. Diskilin/geymin verður latin inn saman við uppgávusvarinum.

7. Bara disklar/geymar frá Føroyamálsdeildini mugu vera í próvtøkuhølinum.

8. Tá próvtøkutíðin er farin, skal uppgávusvarið vera liðugt prentað og skal vera lagt í próvtøkuumslagið saman við disklinum/geymanum.

9. Tað er studenturin sjálvur, sum velur út tey ørk, ið skulu latast inn til døming. Øll útskrivað ørk skulu byrja við navninum á studentinum og hava dagfesting og síðunummar á. Undirskrift skal vera á seinasta arki. Diskilin/geymin kann *ikki* nýtast sum kladda ella sum skjalprógv fyri, hvat møguliga skuldi verið latið inn.

10. Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av regluliga at goyma tekstin, meðan próvtøkan fer fram. At teksturin ikki er goymdur, gevur ikki grundarlag fyri at fara til endurprótøku.

11. Um streymslit er, meðan próvtøkan fer fram, ella aðrir trupulleikar taka seg upp, sum ikki beinleiðis kunnu verða bøttir í sambandi við at nýta telduútgerð, heldur próvtøkan fram uttan at teldan verður nýtt. Tí er tað eisini sera týdningarmikið, at teksturin javnan verður goymdur á disklinum/geymanum og skrivaður út.

12. Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at telduútgerðin riggar. Eingin teldukønur verður til staðar at hjálpa. Um so er, at trupulleikar stinga seg upp í telduútgerðini hjá tí einstaka, verður ikki longt um próvtøkutíðina, ei heldur verður møguleiki fyri endurprótøku. Studenturin skrivar tí víðari við hond og kann annars til eina og hvørja tíð byrja at skriva við hond heldur enn teldu.

13. Eigarin av teldu og prentara hevur sjálvur ábyrgd av, at ognin er tryggjað móti stuldri ella herverki, meðan ognin stendur á setrinum.

14. Til próvtøku, har loyvt er at nýta teldu, skal studenturin boða frá, at hann ynskir at nýta teldu. Hetta verður gjørt á skrivstovuni, sum ásetur eina freist og útflýggjar tekningarskjal.

15. Studenturin kann ikki taka telduútgerðina út úr próvtøkuhølinum, fyrr enn tann síðsti próvtakarin hevur latið uppgávusvarið inn.

Postrúm 272 FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14 FO 100 Tórshavn | Heimasíða www.setur.fo | Teldupostur setur@setur.fo | Telefon: 35 25 00 | Faks: 35 25 01